# Nýggja vaktarskipið varð flotað mánadagin

*Byggingin gongur sum ætlað og nýggja skipið verður latið Landsstýrinum 1. oktober. Tað verður eitt sera stórt framstig, sigur Vaktar og Bjargingartænastan*



*Hetta verður nýggja álitið hjá føroyingum á sjónum. Nýggja vaktar-og bjargingarsskipið er longu sjósett, men nú skal tað gerast liðugt innan og málast. Nýggja skipið er væl útgjørt, sigur Johan Simonsen á Vaktar- og Bjargingartænastuni*

ÁKI BERTHOLDSEN

Byggingin av tí nýggja, føroyska vaktar- og bjargingarskipinum, gongur sum ætlað.

Tað verður smíðað á „Myklebust" skipasmiðjuni beint uttan fyri Ålesund í Noregi.

Og nú er tað komið so langt, at tað er sjósett.

Tað var sennapartin mánadagin, at skipið varð flotað, men enn er sjálvsagt nógv eftir at gera við tað, alt skal gerast innan, tað skal innrættast og øll útgerðin skal setast upp og so skal tað sjálvandi málast.

Johan Simonsen á Vaktar- og Bjargingartænastuni, sigur, at sostatt gongur byggingin sum ætlað.

Eftir ætlanini skal skipið latast Landsstýrinum 1. oktober í ár og tað fer at halda, leggur hann afturat,

**Sera væl útgjørt**

Johan Simonsen sigur, at tað nýggja vaktarskipið er sera væl útgjørt.

Tað er 63 metrar langt og tað eru næstan 20 metrar longri enn vaktar & bjargingarskipið Tjaldrið, sum er góðar 44 metrar langur.

Og tað siglur skjótt, men akkurát, hvussu skjótt tað siglur, er ein loynidómur, sum treyðugt verður upplýst, hvat vaktarskipum og herskipum viðvíkur, og tað vil Johan Simonsen heldur ikki avdúka í hesum førum.

– Men tað er als ongin ivi um, at nú klára vit at sigla Paul Watson upp, skuldi hann komið aftur.

Nýggja Vaktarskipið hevur eisini fingið navn, men heldur ikki tað, vil Vaktar- og Bjargingartænastan avdúka enn.

Annars hevur skipið tangar og útgerð til at taka olju upp av sjónum, skuldi eitt óhapp hent.

– Vit hava eisini góðar umstøður umborð til at hýsa nógvum fólki, skuldi eitt skip gingið burtur og tað varð neyðugt at bjarga nógvum fólkum ísenn.

Á nýggja skipinum skulu eisini hentleikar gerast, so at sjómansskúlin kann brúka tað til starvsvenjing hjá næmingunum.

Av aðrari, nútímans útgerð kann nevnast, at nýggja skipið hevur heilt serliga útgerð til at leita eftir fólki í sjónum, ella fólki, sum, t.d. er dottið oman.

Tað er ein hitasøkjari, sum ger vart við seg, beinanvegin hann følir okkurt í sjónum, ella í berginum, sum gevur hita frá sær, eitt nú einum fólki og tað er ótrúliga hent.

*Eitt, sum hevur verið nógv umrøtt, er tyrlupallurin. Er tað eitt mistak, at tyrlupallur ikki er umborð á skipinum?*

– Tað hava vit mett er ikki neyðugt, tí tað er ikki so langt at flúgva her um leiðir.

– Í sambandi við tað nýggju tilbúgvingina, sum væntandi verður sett í verk, er hugsað um tað, tí skulu nýggjar tyrlur útvegast, verða tær langtberandi og fáa støð á landi.

– Og skulu vit hava tyrlupall, eru harðar treytir við.

– Tá verða so nógv krøv sett, at talan hevð blivið um eitt heilt annað skip. Og krøvini til manning hevði eisini blivið heilt onnur.

Ofta, tá ið skip og fólk koma soleiðis fyri, at tað er neyðugt at seta bjarging í verk, eru tilburðir, har ið skip sigla á land, ella fólk dettur oman.

Vit spurdu eisini Johan Simonsen, hvussu hetta nýggja skipið er hóskandi at fara heilt inn undir land, kanska í ringum líkindum at bjarga fólki, ella skipi.

Eftir, hvat skilst á honum, er hetta nýggja skipið betri hóskandi til bjarging úti á sjónum, har tað ræður um at koma skjótt fram til skip og fólk í havsneyð

– Men annars skuldi tað borið til at komið nokk so nær landi við hesum skipinum, eisini hóast talan kanska ikki er um so heilt góð líkindi. Við at pumpa sjógv úr tangum, kann skipið fáast at flóta væl hægri, enn tað ger vanliga.

– Og umframt at hava skrúvur aftan, hevur tað eisini síðuskrúvur bæði har frammi og har afturi, og harafturat hevur tað azimuth skrúvu, tað er ein skrúva sum stingur beint niður úr kjølinum og sum kann vendast allar vegir.

–Alt hetta ger, at tað ber til at hava skipið púra stilt í sjónum og at halda eina heilt neyva knattstøðu.

Men er tað útgrunt, ella er nógvur pálandsvindur, er tað sjálvsagt avmarkað, hvat hetta skipið kann gera.

– Men í slíkum føri hava vit eisini Tjaldrið, sum er minni, og sum er sera væl hóskandi til at fara undir land við.

Og Tjaldrið, sum varð klassað um nýggjársleitið, er í sera góðum standi enn, so tað heldur í nógv ár afturat.

**Rættari at byggja nýtt**

Tá ið tað varð samtykt at byggja hetta skipið, vóru tað summi sum mæltu til at keypa danska verjuskipið „Beskytteren" ístaðin fyri.

Men Johan Simonsen ivast ikki í, at tað var rætt at byggja nýtt skip, sum er skræddaraseymað til okkara viðurskifti.

– Vit mugu ikki gloyma, at „Beskytteren" er eitt gamalt skip. Og tað er spurningurin, hvussu rætt tað er av okkum, at byggja okkara framtíðar trygd á sjónum á eitt skip, sum danir leggja.

Johan Simonsen sigur, at tá ið tað nýggja skipið er komið í flotan, er trygdin á sjónum munandi batnað.

Tá hevur Vaktar & Bjargingarfelagið tvey skip afturat tí nýggja, nevniliga Tjaldrið og Spógvan.

Og harafturat hava vit so tað danska verjuskipið, hvørs týdningur ikki skal undirmetast, tí tað skipið er stórt og kemur sera væl við, tá ið skip eru í havsneyð úti á víðum havi og í illveðri.

– Tað hava verið hendingar, har ið tað hevði verið heilt galið, um vit ikki høvdu havt danska verjuskipið.

Tað sóu vit eina best tá ið Ågot var fyri vanlukku herfyri.Tá var illveður og tað var ikki at bjóða til hjá Tjaldrinum at fara til hjálpar. Men tá kundi danska verjuskipið leggja til havs og fara til hjálpar við nógvar ferð, og tað hevði ómetaligan týdning

Hann leggur tó afturat, at við hesum nýggja skipinum hevði eisini borið til at farið til hjálpar tað ferðina.

# Fyrireika seg longu til kommuval í heyst

*Javnaðarflokkurin fer hetta vikuskiftið at hava skeið í kommunalpolitikki fyri komandi valevnum og fyri øllum áhugaðum limum í flokkinum annars*

ÁKI BERTHOLDSEN

Tað er altíð gott at vera væl fyrireikaður. Ikki minst í politikki kann góð ella vánalig fyrireiking skjótt gerast munurin ímillum viðgang og mótgang.

Og hóast kommunval ikki verður fyrr út ímóti ársenda, fer javnaðarflokkurin longu nú at fyrireika seg til kommunuvalið.

Um vikuskiftið fer flokkurin at hava skeið kring landið fyri áhugaðum limum í flokkinum og fyri teimum komandi valevnunum.

Fyrsta skeiðið verður á Hotel Tvøroyri fríggjakvøldið frá klokkan 18 til út ímóti midnátt.

Annað skeiðið verður



*– Tað hevur stóran týdning at politikarar duga at samskifta við veljaran, sigur Eyðálvur Dimon, skrivari javnaðarfloksins*

á Hotel Hafnia í Havn, leygardagin klokkan 10 ár morgni til umleið klokkan seks um kvøldið.

Og triðja skeiðið verður á á gamla Tekniska skúla í Klaksvík týskvøldið klokkan sjey til út ímóti midnátt.

Orsøkin til, at skeiðini eru júst á hesum støðum, er, at hetta eru øki, har stillað verður upp politiskt til kommunuvalið.

men sjálvandi vónar floksleiðslan, at eisini javnaðarfólk úr øðrum kommunum eisini koma á skeiðið.

Tað verður í mesta mun Eyðálvur Dimon, skrivari javnaðarfloksins, sum stendur fyri skeiðunum.

Hann sigur, at í stuttum er meiningin við skeiðunum at leggja eina ætlan fyri, hvussu floksins umboð á besta hátt fáa boðað boðskap floksins.

– Og meiningin er sjálvsagt eisini at fyrireika valevnini til kommunuvalið.

– Tað er ógvuliga umráðandi at hava eitt gott samskifti ímillum politikarar og veljaran.

Hann nevnir t.d. at fyri nøkrum árum síðani var javnan at hoyra, at fólk høvdu fingið andstygd fyri politikarum. Ein trupulleiki sum gjørdi seg galdandi tá, var, at samskiftið ímillum politikaran og vanliga fólkið var ov vánaligt

Hann sigur, at eitt av høvuðsmálunum verður uppskotið hjá javnaðarflokkinum til nýggja, solidariska kommunuskipan. Uppskotið er at síggja á heimasíðuni hjá javnaðarflokkium, sum eitur: **www.javnadarflokkurin.fo**



# Vantandi ráðlegging

*Ov nógvar kanningar og manglandi støðutakan er ein orsøk til, at íbúðarviðurskiftini hjá brekaðum ikki eru nøktandi*

Edvard Joensen

Væntandi politisk ráðlegging er ein stórur trupulleiki, tá hugsað verður um bústaðarviðurskiftini hjá teimum brekaðu í Føroyum.

Bjarni Clementsen, leiðari á Serstovnadeildini, sigur, at tað hava seinnu árini verið rættiliga skiftandi landsstýrismenn á økinum. Allir hava ein góðan vilja og skulu kanna málið. Ofta kemur tað ikki longri, tí pengarnir verða prioriteraðir aðrastaðni.

Tað, sum brúk er fyri, sigur Bjarni Clementsen, er at politikararnir seta pengar av til íbúðir til hesi fólkini.

Bjarni Clementsen metir ikki, at allar hesar kanningarnar hava verið neyðugar. Tøl og tørvslistar hava verið, tó bara seinastu trý-fýra árini. Men nú er so avgjørt at dagføra teir alla tíðina, sigur Bjarni Clementsen

Felagið Javni legði í apríl í ár fram eitt álit, sum greitt vísir tørvin, ið var 1. apríl. Men hann er longu broyttur, sigur Bjarni Clementsen, tí tað ger hann alla tíðina.

Fyrr hevur tað verið soleiðis, at so hvørt sum onkur hevur víst á einhvønn akuttan tørv, er tað einstaka málið loyst. Ofta fyribils. Men hesum ber ikki til at liva við, og tí hevur Javni nú saman við øðrum gjørt ein nágreiniligan tørvslista, sum er lagdur fram í tí áliti, sum millum onnur landsstýrismaðurin í Almanna- og Heilsumálum eisini fekk.

-Nú er hesin tørvurin so nágreiniliga ávístur, at tað ber ikki til at bakka, sigur Bjarni Clementsen, leiðari á Serstovnadeildini.

Men hóast tað, at álitið hjá Javna varð latið avvarðandi myndugleikum, sum lovaðu at lesa tað og gera okkurt við tað, er einki frætt aftur enn, sigur Bjarni Clementsen.

Tað er ikki rætt at siga, at als einki hendir, sigur Bjarni Clementsen. Tí tað ger tað alla tíðina. Men í mun til veruliga tørvin hendir ógvuliga lítið. Og tað sindrið, sum hendir, munar ov lítið í heildini. Sjálvandi er tað ein loysn hjá tí einstaka, men í mun til samlaða tørvin er tað altso ikki nøktandi, sum hent er higartil, sigur hann.

Tað er ikki tí, at politiski myndugleikin ikki veit av hesum, sigur leiðarin á Serstovnadeildini. Hetta verður gjørt vart við hvørt einasta ár, tá fíggjarlógin verður gjørd. Og nú verður spennandi at vita, sigur hann, um tørvurin, sum vístur er á í álitinum hjá Javna, verður tikin við í komandi fíggjarlóg, sum politikararnir eru í ferð við at gera nú.

Tað er rætt, at tað er dýrt at gera eitt sambýli til seks brekað fólk, sigur Bjarni Clementsen. Men tað er neyðugt at gera eitt hús við íbúðum, tí soleiðis eru krøvini í dag. Tað er ikki nøktandi bara at geva hesum fólkunum eitt kamar onkustaðni. Nú er kravið egin íbúð. Og tað sigur seg sjálvt, at ein bygningur við seks baðirúmum og seks smærri køkum umframt einum stórum felagskøki og øðrum felagsrúmum, kostar meira enn eitt hús við einum av hvørjum, vísir hann á.

Tá tosað verður við politikararnar, er viljin altíð góður. Men tað er nú einaferð pengunum, brúk er fyri, og teir verða ikki altíð játtaðir, sum tørvur er á teimum.

Men búfólkini gjalda leigu fyri at búgva. Hesi fólkini fáa vanliga eina pensión, sum tey millum annað brúka til at gjalda húsaleigu við. Bjarni Clementsen vísir á, at búgva til dømis seks ella átta fólk í einum sambýli, skal bygningurin verða øgiliga dýrur, um tey ikki klára at svara hvørjum sítt av pensiónini, tey fáa.

Heilt í stað stendur tó ikki, sigur Bjarni Clementsen. Í løtuni verður arbeitt við einum nýggjum húsið í Klaksvík, har ætlanin er, at pláss skal vera fyri fýra autistum og fýra menningartarnaðum. Hetta húsið skal ætlandi standa liðugt komandi summar, sigur Bjarni Clementsen, leiðari á Serstovnadeildini undir Heilsuróktini og Serforsorgini.



*Manglandi ráðlegging er ein orsøk til, at bústaðartrupulleikarnir hjá brekaðum í Føroyum ikki eru loystir, sigur Bjarni Clementsen, leiðari á Serstovnadeildini*

## Foreldur: Nú er tann stundin...

*Ert tú ein teirra, sum ikki sleppur aftur til arbeiðis aftur orsakað av væntandi ansing, kom so á aðalfund hjá foreldrafelagnum mánakvøldið. Her verður tosað um, hvussu barnaansingin í Havn kann skipast næstu árini. M.a. fer Gunleyg Durhuus, trivnaðarstjóri, at greiða frá útbyggingarætlanunum í Vesturbýnum.*

Í hesum døgum verða stovnsplássini í heyst givin teimum hepnu. Tíverri er støðan í høvuðsstaðnum, at tað enn eru alt ov fá ansingarpláss. Kommunan hevur seinasti árini útvega fleiri nýggj ansingarpláss, men ikki nóg mikið.

Tað verður tosað um at opna Havnará, tað nýggjasta er at yvirtaka Ebenezer og byggja teimum ein nýtt samkomuhús - hvussu nógvar milliónir tosa vit um? Tá vit tosa um pening til barnaansing vísir tað seg, sum um, at tað er púra burturvið at byggja fleiri nýggjar stovnar eitt ár, hóast hesir ikki kostað ein brøkpart av slíkum ætlanum.

Pengar verða brúktir at gjalda niður kommunuskuldina, summir býráðslimir tosa um at seta kommunuskattin niður. Vit í foreldrafelagnum halda, at tað má raðfestast øðvísi. Setið tykkum sum mál at fáa marruna hjá smábarnafamiljum í Havn loysta. Setið æru í at seta tykkara merki á Havnina: Leivur Hansensa Vøggustova, Elin Lindenskovsa Barnagarður, Heðin Mortensensa Barnagarður, Katrin Dahlsa Ellisheim, Lisbeth Petersensa Røktarheim og so framvegis.

Tað er einki skeivt í at fríðka Havnina og hava nógv góð mentunartiltøk og góðar karmar, men loysið teir átrokandi trupulleikarnir fyrst (ella samstundis). Hvat halda tit borgarnir í Havnini ynskja, nú kommunuvalið nærkast.

Heldur tú, at meira kundi verið gjørt við barnaansingina í Havn? Hevur tú fingið at vita, at onki pláss er til títt barn í ár? So er Foreldrafelagið rætta staðið fyri teg. Aðalfundurin hjá Foreldrafelagnum verður í Mettustovu 8. mai 2000, kl. 20.00. Á fundinum fer Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóri, at greiða frá um gongdina í útbyggingunum á barnaansingarøkinum, sigur nevndin í foreldrafelagnum í Havn.

DANMARK
SKOTLAND
ÍSLAND

Aftur og fram, tá 2 ferðast saman, úr kr.

1.480,-

Ferðaavgjald kemur afturat prísinum.

Atlantic Airways

Vága Floghavn, FO-380 Sørvágur, Tel 333 900, Fax 333 990, e-mail: booking@atlanticairways.fo

SANSIR TEL 355 355